# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um góða vin okkara Dia



Tá ið leið móti jóla og vetur er, so komu boð eftir tær góði Dia – tær, sum untist at fáa 60 ár her a foldum. Tað hevur verið ein góð tíð hjá tær og eisini hja okkum, sum kendu teg. Tú hevur verið ein góður vinur fyri meg og børnini. Tú byrjaði at koma inn á gólvið hjá okkum, tá tú og Tórur róu út saman fyri umleið 30 árum síðan; og tú komst her so gott sum hvønn dag til tú bleivst sjúkur síðsta vár.

Eg vil goyma minnini i mínun hjarta, tá tú vart her á føðingardegi mínun í maj, og sat her og hugnaði tær í millum okkum. Eg roknaði ikki við, at tað var síðstu ferð, at tú vart her hjá okkum. Men Jesus pápi valdi at taka teg heim nú, og har hvílir tú nú góði Dia.

Hvíl i friði

**Bryngerð**

## Minningarorð um Gardar Høgnesen

Tað kom dátt við hjá mær, at Gardar skuldi fara her frá so knappliga. Vit hava havt nógv saman, hava búð yvir av hvørjum øðrum sum børn og vóru altíð grannar.

Eg og Gardar spældu altíð saman sum børn, og eg minnist, hvussu glað vit bæði fóru í skúlan fyrstu ferð. Men eg kom so kedd aftur, tí eg slapp ikki at sita hjá Gardar.

Tað hevur altíð verið nakað serligt ímillum okkara heim og heimið hjá Gardar. Niðan til Billu og Hjalmar vóru øll hjartaliga vælkomin, har var altíð fult av børnum, øll børnini í grannalagnum føldi seg vælkomnan inni har, og eg minnist, hvussu vit reikaðu um alt húsið og spældu krógva lykil, ofta var tað buldraligt, men ongantíð eitt øvugt orð frá Billu.

Nógv gott er at minnast aftur á, allir teir túrarnir Hjalmar tók okkum við til, til Skúvoyar, Hest og við Barskor. Og øll børnini sum Billa tók við til Mikladals á hvørjum ári. Hetta vóru góðir dagar, sum vit ongantíð fara at gloyma.



Eg minnist eisini hvussu hugnaligt tað var jólaaftan at sleppa niðan til tykkara, aftaná at vit høvdu pakkað pakkarnar út. Altíð var tað so spennandi at vita hvat tit høvdu fingið í jólagávu frá systkinabørnunum í Danmark. Eisini minnist eg, tá ið ommudidd plagdi at sita barnagenta hjá tykkum, hvussu stuttligt vit hildu tað vera. Hon fortaldi altíð onkra góða søgu, og vit klandraðust um, hvør skuldi sita á beinkinum við síðuna av ommudidd.

Ja, saknurin verður stórur hjá okkum eisini. Gardar var trúfastur, hann kom ofta inn á gólvið og var sera áhugaverdur at práta við, hann læs nógv, hevði eina ótrúliga stóra vitan, bæði um søgu og samfelagsviðurskifti og mangt annað.

Ja, tíðir koma hjá tykkum, sorgin kann vera tung at bera, tyngri enn nakað menniskja kann gruna, men tann friður sum Jesus gevur er ikki tengdur at skiftandi kenslum. Krossurin stendur líka fastur, um hann í løtuni stendur huldur í myrkri.

Góða Billa, Hjalmar og tit øll. Eg vil enda við at takka tykkum fyri alt, sum tit hava verið fyri okkum. Má Jesus styrkja tykkum framyvir.

Ærað veri minni um Gardar.

**Gertrud**

## Til minnis um Gardar Høgnesen

Tung vóru boðini, eg fekk frá skiparanum tíðliga mánamorgun, at Gardar var farin. Ikki vardi tað meg, tá ið eg fór avstað, at vit ikki skuldu síggjast aftur her á fold.

Tú hevði ringt á mína telefon, tá ið vit vóru inni í Norra fyri nakað síðan. Tankarnir leita um ta tíð, vit hava havt saman ígjøgnum alt lívið. Vit vóru so at siga javngamlir og grannar alt lívið. Vit spældu nógv saman sum ungir og eg var onkrar ferðir við tykkum, familjuni, norðuri í Mikladali í summarfrí.

Sum eldri blivu vit báðir sjómenn og sigldu hvør sína leið, men onkuntíð hava vit siglt saman, bæði við Bjørgvin og við Ågot. Tú gjørdi tær ikki til skammar, har tú vart, raskur vart tú, og kreftirnar hevði tú góðar. Men um vit sigldu við ymiskum skipum, hildu vit altíð samband við hvønn annan, komu inn til hvønn annan og ringdu til hvønn annan. Tá vit báðir vóru heima samstundis, stukku vit altíð inn á gólvið hjá hvørjum øðrum, og mangan góðan kaffimunnin havi eg fingið inni hjá tykkum.

Altíð vart tú til reiðar at hjálpa, um eg bað teg hjálpa mær við onkrum. Eg minnist væl fyri nøkrum árum síðan, tú hjálpti mær at stoypa í kjallaranum, tá var gott at hava ein við góðum evnum. Ongantíð gramdi tú teg um nakað og fyri tey óhapp tú vart fyri nú seinastuni, klagaði tú ongantíð, men segði altíð, at tað gekk betri. Eg gloymi ongantíð, einaferð vit sita inni hjá tær og tosa um lívsins viðurskifti, og tosið fellur á, at alt sær so svart út, at tú sigur, at tað altíð blívur betri aftur, soleiðis vart tú, klagaði ongantíð.

Eg havi mist ein góðan vin í tær Gardar, og tómligt verður tað at koma heim aftur og ikki at síggja teg aftur, men eg trúgvi at tú hevur tað gott, har tú ert nú.

Má Harrin styrkja tykkum í sorg tykkara, ið eftir sita.

**Heilsan Alex, umborð á Sundaberg**

## Nýggjur depilsleiðari á psykiatriska deplinum

TÍÐINDASKRIV



Tormóður Stórá er settur sum læknafakligur depilsleiðari fyri Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, galdandi frá 1. februar 2006. Hann fær við hesum ta ovastu rakstrarligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av Psykiatriska deplinum og skal leiða depilin saman við Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi.

Umskipanin av leiðsluni er gjørd eftir at Sofus Joensen, leiðandi yvirlækni hevur ynskt at verið loystur frá leiðsluuppgávuni á deplinum.

### Dagurin í morgin

**17. februar. Finandus**, deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

### Krúndiamantbrúdleyp

Hósdagin 16. februar hava Martha og Steingrim Simonsen í Vestmann verið gift í 65 ár. Dagurin verður hildin í heiminum á Hallarvegi 12 saman við familjuni.

## Lesandi flúgva bíligari

Atlantic Airways bjóðar nú lesandi uttanlands bíligari ferðir á øllum rutunetinum.

Talan er allar ferðir, sum hava fráferð til Føroya í tíðarskeiðnum frá 1. juni til 10. juli. Treytirnar fyri tilboðnum eru, at tey ferðandi eru millum 18 og 32 ár. At tey kunnu prógva, at tey eru lesandi uttanlands. Og at uppihaldið í Føroyum ikki er longur enn tríggjar mánaðir.

Lesandi, sum vilja bíleggja sær slíkar ferðir, skulu gera hetta í seinasta lagi á grækarismessu, sum er 12. mars.

Sparingin hjá teimum, sum keypa hesir ferðir, eru millum 1.030 og 1.357 kr., tá sammett verður við teir prísir, sum annars eru galdandi fyri semi-flex ferðaseðlar.

Bíleggjast kann á ferðaskrivstovum ella á heimasíðuni hjá Atlantic Airways, www.atlantic.fo.

**-mørk**

